Sosialurin





## Gassverk sprongdist

Myndugleikarnir í amerikanska statinum Connecticut vita ikki, hvussu mong fólk vóru til arbeiðis, tá ein hørð spreinging var á einum gassverki har í gjár. Borgarstjórin í býnum Middletown segði á tíðindafundi í gjárkvøldið, at minst fimm fólk høvdu latið lív í spreingingini, og at tólv høvdu fingið skaða. Umleið 200 fólk arbeiða á gassverkinum, men í morgun vistu myndugleikarnir ikki við vissu, hvussu mong teirra vóru á verkinum, tá spreingingin var. Summir fjølmiðlar skrivaðu, at vanlukkan kann hava kravt umleið 50 mannalív.

## RG skal ikki einskiljast

Leiðslan í Royal Greenland heldur ikki, at grønlendska landsstýrið eigur at taka stig til at einskilja fyritøkuna ella í hvussu er ikki enn. Í fjør hevði Royal Greenland næstan 200 milliónir krónur í halli, og forstjórin, Flemming Knudsen, sigur við kringvarpið KNR, at tað er burturvið at tosa um einskiljing, so leingi tey niðastu tølini í roknskapinum eru reyð. Grønlendska arbeiðsgevarafelagið hevur mælt politiska myndugleikarnum til at selja privatum Royal Greenland ella í minsta lagi partar av fyritøkuni.

# Privata vinnan yvirtekur virksemi hjá Landsverki

**Alt alment virksemi skal bjóðast út í fría kapping og Landsverk skal gera sum minst sjálvur, sigur landsstýriskvinnan í innlendismálum**

BYGGIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Landsverk letur privatu vinnuna gera mest sum alt arbeiði fyri seg og seinastu 10 árini er maskinhópurin hjá stovninum minkaður niður í helvt*

*Savnsmynd*

Alt alment byggivirksemi skal bjóðast út í fría kapping í privatu vinnuni.

Tað hevur Annika Olsen, landsstýriskvinna givið Landsverki boð um.

Og nú hevur hon eisini givið boð um, at alt asfaltarbeiði skal eisini bjóðast út í almenna kapping.

Hon sigur, at tey einastu arbeiðini, sum Landsverk skal standa fyri sjálvur, eru smáarbeiði, sum tað ikki loysir seg at bjóða út, eisini tá ið hugsað verður um, hvat tað kostar at gera útbjóðingartilfar.

Ein onnur orsøk til, at alt ikki verður bjóðað út, er, at Landsverk vil varðveita eitt ávíst vitanarstøði á sjálvum stovninum.

### Landsverk grópar til sín

Í Løgtinginum hendan dagin vildi Bjørt Samuelsen hava at vita frá landsstýriskvinnuni um broytingar eru hendar í virkseminum hjá Landsverki so at stovnurin sjálvur ger meiri og meiri arbeiði, sum privat virki annars kundu tikið sær av.

Hon vísir á, at Vinnuhúsið hevur undrast á, at almennir stovnar økja um sítt virksemi, meðan vinnufyritøkurnar kenna seg noyddar at siga starvsfólkum úr starvi.

Almennir stovnar hava ikki krøv um avkast og teir fáa pening á fíggjarlógini til at endurnýggja amboð og útgerð.

Í øllum førum hevur Bjørt Samuelsen frætt, at Landsverk er farið at dubba sína maskinhóp og at keypa útgerð, sum styrkir almenna stovnin kappingini við privatu vinnuna.

### Alt bjóðast út

Annika Olsen sigur, at Landsverk sendur uppgávur út í fría kapping í størri mun nú, enn hann gjørdi fyrr.

- Áður var vanligt, at Landsverk sjálvur gjørdi nýggjar landsvegir og nýggjar havnir, men tað kemur næstan ikki fyri longur, uttan har talan er um smáarbeiði.

Tað sama ger seg galdandi fyri almennar bygningar, sum eisini verða bjóðaðir út í fría kapping.

- Fyrr var eisini vanligt, at Landsverk sjálvur projekteraði vegir og havnir, men tað verður bert í heilt lítlan mun gjørt nú, tí eisini projekteringsuppgávurnar verða bodnar út í fría kapping í privatu vinnuni.

- Í 2008 og í fjør gjørdi privata vinnan yvir 95% av projekterings- og byggiarbeiðnum, sum Landsverk stóð fyri.

Hvat projekering viðvíkur, gjørdu privatu fyritøkurnar 100% av projekteringsarbeiðnum í 2008 og í fjør gjørdu tær 99% privat og Landsverk gjørdi bara 1% av projekteringsarbeiðnum.

Hvat sjálvum byggiarbeiðnum viðvíkur, gjørdi Landsverk bara 3,5% av arbeiðunum og í fjør gjørdi Landsverk bara 4,1% av byggiarbeiðnum ímeðan privata vinnan gjørdi restina.

Sostatt er tað bert ein viðfáningur av játtanini til Landsverk, sum ikki verður boðin út til privatu vinnuna at kappast um.

- Seinastu árini hevur Landsverk ikki bjóðað upp á egin arbeiði, men av og á hava arbeiðstakarar biðið stovnin um tilboð upp á ymsar undirveitingar.

Annika Olsen afturvísti samstundis, at Landsverk er farin at dubba hópin av maskinum.

Tvørturímóti upplýsti hon, at hesi seinastu 10 árini er maskinhópurin hjá Landsverki minkað næstan niður í helvt.

Tinglimir tóku undir við, at so nógv sum gjørligt verður boðið út til privatu vinnuna at kappast um, tí try vóru púra vís í, at hetta var besti mátin at fáa sum mest fyri hvørja krónu.

Hópuppsøgn í Kollafirði:

## 22 fólk uppsøgd á Vestlaxi



*Mynd: Jens Kristian Vang*

Nú er næstan ikki vika, har tað ikki frættist um hópuppsagnir á onkrum føroyskum virki.

Og aftur dagurin í dag er ein døpur løta í so máta, tí nú er tað Bakkafrost-Vestlax samtakið, sum stóð fyri tørni at siga fólki upp.

Í morgun varð arbeiðsfólkið á Vestlaxi í Kollafirði kallað saman til fundar á virkinum og har fingu tey tað váttað, sum tey høvdu illbatan av, tí longu áðrenn fundin vóru leysasøgur farnar at ganga um, at fólk í hópatali skuldu sigast úr starvi.

Á fundinum vórðu 22 fólk søgd upp á virkinum

Talan er bæði um mannfólk og konufólk, men tað er verri enn so alt kollfirðingar, tí tey eru nógva staðni frá.

Nógv teirra eru nýliga byrjað í starvi, men onkur av teimum uppsøgdu hava verið á virkinum í yvir 10 ár.

Á Vestlax hava tey arbeitt í tveimum vaktum og tað er mestsum ein heil vakt, sum er søgd upp.

Eitt av uppsøgdu starvsfólkunum sigur, at tey fingu at vita frá leiðsluni, at tað er ikki nóg mikið av fiski at taka til at hava tvær vaktir til arbeiðis.

### Neyðugt við tillagingum

Beint fyri døgverða segði Bakkafrost í tíðindaskrivi, at eftir at føroyska alivinnan í 2009 seldi útvið 60.000 tons av aldum fiski, verður nakað minni av tøku í ár enn undanfarna ár.

Orsøkin er, at færri smolt vórðu sett út í 2008 enn í 2007.

Bakkafrost hevur tvey kryvjivirki, sum við fullari orku kryvja umleið 1.000 tons av laksi um vikuna. Nú mongdin av laksi í 2010 er minkandi, verður neyðugt at tillaga orkuna, og tí verður farið frá skiftivakt skipanini á kryvjivirkinum í Kollafirði niður á eina vakt.

Á virkinum í Klaksvík er bert ein vakt, og har verður eingin broyting.

Avleiðingin av minnu nøgdini í ár er tíverri, at tað er neyðugt at siga 22 fólkum úr starvi á virkinum í Kollafirði, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost.

Í 2009 varð meira smolt sett á sjógv aftur, og eftir ætlan verður mongdin av laksi í 2011 aftur á minst somu mongd sum í 2009, leggur Bakkafrost afturat.